**Mentamálaráðið**
Fólkaskúladeildin

## Endurlýsing:

# Starv sum útoyggjalærari í Mykines skúla

**Starvið sum útoyggjalærari í Mykines skúla verður lýst leyst til setanar skúlaárið 2008/09. Komandi skúlaár verða 2 næmingar í Mykines Skúla.**

**Um starvið**
Útoyggjalærarin er bæði leiðari og lærari skúlans og hevur sjálvur alla undirvísingina í skúlanum. Starvið er fulltíðarstarv.

**Søkt verður eftir útoyggjalærara, sum**
- undir ábyrgd skúlamyndugleikanna skal hava fyrisitingarligu og námsfrøðiligu leiðsluna og ábyrgd av virksemi skúlans
- skal fremja góðar arbeiðsumstøður og gott samstarv millum skúla og heim.
- skal vera førur fyri at loysa trupulleikar
- í samstarvi við foreldrini skal virka fyri, at næmingarnir fáa sum mest burtur úr skúlagongdini bæði fakliga og sosialt
- skal hava regluligt samstarv við Sørvágs Skúla.

**Førleikakrøv**
Umsøkjari skal hava fólkaskúlalærara-útbúgving og starvsroyndir í fólkaskúlanum.

**Lønar- og setanartreytir**
Setanarøkið er undir Mentamálaráðnum við tænastu í Mykines skúla.

Starvið er flokkað í lønarflokkunum 27.1, 28.1, 29.1, 29.2 og 31.2 sambært avtalu millum Fíggjarmálaráðið og Føroya Lærarafelag.

**Umsóknir**
Umsókn saman við prógvi, C.V. o.ø. skal verða Mentamálaráðnum í hendi í seinasta lagi 12. august 2008 kl. 12.00.

**Umsóknin verður stílað til:**
Mentamálaráðið
Hoyvíksvegur 72
Postrúm 3279
110 Tórshavn
ella við t-posti: mmr@mmr.fo

Tey, ið ynskja fleiri upplýsingar um starvið, kunnu ringja til Jenny Lydersen, undirvísingarleiðara, tlf. 227647.

Mentamálaráðið hevur sum høvuðsuppgávu at fyrisita undirvísingarmál, mentamál og gransking. Harafturat eru uppgávur viðvíkjandi kirkju, loftmiðlum, ítrótti og øðrum frítíðarvirksemi.

---

# STØRV Á LANDSSJÚKRAHÚSINUM

## Deildarljósmóðir – endurlýsing

Eitt starv sum deildarljósmóðir er leyst at søkja við setan 1. september 2008 ella skjótast gjørligt.

Deildin er ein kombinerað viðgongu-, føði- og barsilsgongd við neonatalari funktión.

Á deildini starvast ljósmøður, sjúkrarøktarfrøðingar og sjúkrahjálparar.

Deildarleiðarin hjá ljósmøðrunum hevur ábyrgd av tí dagligu leiðsluni og ljósmøðrafakligu leiðsluni av viðgongu, føðing og normalum barsil, vísandi til leiðandi ljósmóðir.

**Førleikakrøv**
- Útbúgving sum ljósmóðir
- Praktiskar royndir innan viðgongu, føðing og barsil
- Royndir innan leiðslu og/ella vilja til at nema sær útbúgving innan leiðslu
- Kunnleika til KT

**Vit ynskja ein deildarleiðara sum**
- Hevur ein sunnan ljósmøðrahugburð
- Er jalig, eldhuga og áræðin
- Hevur góð evni at samskifta og samstarva
- Hevur yvirblikk og kann arbeiða sjálvstøðugt

Meira fæst at vita um starvið við at venda sær til leiðandi ljósmóðir Eyðfríð L. Jacobsen á tlf. 304500, lok. 5301 ella á t-post lseydja@ls.fo

**Umsóknarfreist er 26. august 2008 kl. 12.00**

Lønar- og setanartreytir samb. sáttmála millum avvarðandi yrkisfelag og Fíggjarmálaráðið.
Tað er umsøkjarans ábyrgd at umsóknin er Lønar- og starvsfólkadeildini í hendi, áðrenn freistin er úti.
Skrivlig umsókn við CV, autorisatión, prógvum, skjølum o.l. skal sendast til:
Landssjúkrahúsið, Lønar- og starvsfólkadeildin, FO-100 Tórshavn



**Á Landssjúkrahúsinum**
- er sjúklingurin í miðdeplinum
- eru umleið 200 seingjarpláss
- eru umleið 20 læknafakligar sergreinir
- eru psykiskar og somatiskar seingjardeildir
- eru umleið 800 fólk í starvi í roykfríum umhvørvi
- er virðiligur samverutóni óansæð kyn, húðalit, politiska-, átrúnaðarliga- ella seksuella orientering

Landssjúkrahúsið J.C. Svabosgøta 100 Tórshavn Tel: +298 30 45 00 Fax: +298 31 42 53 lsh@lsh.fo www.lsh.fo

---

**www.sosialurin.fo**

**www.sosialurin.fo**



*Eitt sindur hugnaligari...*

**Hvat við at forkela teg sjálvan ella gleða onkran annan?**

**Tær góðu umstøðurnar kunnu vit bjóða tær.**

**Royn Luddastovu í Leynum ella Bakkastovu við Ljósá.**

**BOOKING:**
**lp@ognir.fo ella tlf. 21 73 00**
**www.ognir.fo**

---

Runavíkar Kommuna

# Lærari til Funningsfjarðar skúla

Søkt verður eftir lærara til uml. 13 tímar um vikuna fyri skúlaárið 08/09.

Endaliga tímatalið verður ásett 1. sept.

Í Funningsfjarða skúla eru 8 næmingar í 1. til 7. flokki.

Umsøkjarar við lærarаútbúgving verða tiknir framum.

Umsøknir skulu verða skúlaleiðaranum í hendi í seinasta lagi mikudagin 13. august, og skulu sendast til Emil Jacobsen, Skálavegur 193, 480 Skála.

Starvið verður lønt sambært avtalu millum Føroya Lærarafelag og Fíggjarmálaráðið.

Meira fæst at vita frá skúlaleiðaranum Emil Jacobsen á tlf. 601804 ella 741804.

**Runavíkar Kommuna**
Postboks 139 · Heiðavegur 26 · FO-610 Saltangará

---

**veitst tú ikki tað?**
**Sosialurin**

---

**KIOSK ACTIV**

# Starvsfólk søkist

Søkt verður eftir **VASKIFÓLKI** til Kiosk Activ í Hornabø og Kiosk Activ í J. Broncks gøtu at byrja skjótast gjørligt.

Nærri fæst at vita við at ringja á tlf. 73 37 40.

Søkt verður eisini eftir **KRAMBAFÓLKI** til Kiosk Activ í Hornabø, Kiosk Activ í J. Broncks gøtu og Kiosk Activ í Steinatúni at byrja skjótast gjørligt.

Nærri fæst at vita við at ringja á tlf. 73 37 41.